LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR

Føroya Løgting.

**Løgtingsmál nr. 70/2008: Grannskoðan av almennum roknskapum**

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til frágreiðing niðanfyri samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Bjálvingarstuðulslánsgrunninum** fyri fíggjarárið **2007**.

## FRÁGREIÐING FRÁ LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM:

## 1. Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið fyri Bjálvingarstuðulslánsgrunnin er Ll. nr. 118 frá 18. juni 1997 "um Húsalánsgrunn o.a." Við heimild í lógini lýsti Landsstýrið 28. apríl 1998 kunngerð nr. 55 "um Húsalánsgrunn o.a."

### 1.1 Endamál

Sambært § 8, stk. 1, í lógini er endamál grunsins at veita stuðulslán til bjálving og orkusparandi tiltøk til avlamis-, einkjufólka- og fólkapensjónistar, sum búgva í egnum húsum ella íbúð.

Sambært § 9, stk. 1, í lógini eru bjálvingarstuðulslán avdráttar- og rentufrí. Frítøkan fyri at rinda avdráttir og rentur heldur vanliga uppat, tá ið húsini ella íbúðin skifta eigara ella verða nýtt av øðrum.

Sambært § 12 í lógini kann eitt bjálvingarstuðulslán í mesta lagi vera 110 t.kr. umframt útreiðslur til kanningar, eftirlit, tinglýsing, veðhavaralýsing og byggirentur.

### 1.2 Fyrisiting

Sambært § 3 í lógini verður grunnurin fyrisitin av einum stýri við 3 limum og tiltakslimum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 4 ár. Stýrið setir stjóra at taka sær av dagligu um- og fyrisitingini, og ásetir við landsstýrisins góðkenning hansara lønar- og setanartreytir. Í Stýrinum sita: John Færø, Klaksvík, formaður, Gurið Joensen, Tórshavn og Tórálvur Weihe, Tórshavn. Eingir tiltakslimir eru valdir.

## 2. Fíggjarviðurskifti

Sambært § 15, stk. 1, í lógini fær Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin árliga játtan á fíggjarløgtingslógini. Ongin peningur er játtaður á løgtingsfíggjarlógini 2001-2007. Peningur, sum kemur inn sum rentur og avdráttur, fer í Bjálvingarstuðulslánsgrunnin.

## 3. Roknskaparviðurskifti

Til tess at kunna Løgtingið um fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 2007, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri árini 2003-2006 tikin við.

### 3.1 Yvirlit yvir gongdina í rakstrinum og í fíggjarstøðuni 2003-2007

t.kr.

| | 2007 | *2006* | *2005* | *2004* | *2003* |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 523 | *381* | *310* | *325* | *360* |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | -811 | *-777* | *-784* | *-913* | *-1.019* |
| Avskrivingar og burturleggingar | - | *-85* | - | - | *-114* |
| **Rakstrarúrslit** | **-288** | ***-481*** | ***-474*** | ***-588*** | ***-773*** |

| **Aktiv** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Tøkur peningur o.a. | 7.835 | *7.691* | *5.475* | *4.257* | *5.269* |
| Veðskuldarbrøv (útlán) | 57.928 | *57.896* | *60.060* | *61.244* | *62.242* |
| Avsett móti tap, veðskuldarbrøv | -500 | *-500* | *-450* | *-450* | *-450* |
| **Aktiv tilsamans** | **65.263** | ***65.087*** | ***65.085*** | ***65.051*** | ***67.061*** |

| **Passiv** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Ognarar | 17 | - | *21* | *17* | *15* |
| Millumrokning, Húsalánsgrunnin | 2.078 | *1.631* | *1.127* | *623* | *2.047* |
| **Skuld tilsamans** | **2.095** | ***1.631*** | ***1.148*** | ***640*** | ***2.062*** |
| Eginogn: | | | | | |
| Eginogn við ársbyrjan | 63.456 | *63.937* | *64.411* | *64.999* | *65.772* |
| Rakstrarúrslit | -288 | *-481* | *-474* | *-588* | *-773* |
| Eginogn tilsamans | 63.168 | *63.456* | *63.937* | *64.411* | *64.999* |
| **Passiv tilsamans** | **65.263** | ***65.087*** | ***65.085*** | ***65.051*** | ***67.061*** |

### 3.2 Millumrokning við Húsalánsgrunnin

Millumrokningin við Húsalánsgrunnin er fyri roknað endurgjald fyri at fyrisita Bjálvingarstuðulslánsgrunnin sambært § 7 í lógini.

## 4. Ársroknskapur 2007

Sambært § 31 í lógini skal ársroknskapurin verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara, og skal síðani verða sendur landsstýrinum við frágreiðing og viðmerkingum frá Stýrinum.

## 4.1 Ársfrágreiðing

Í ársfrágreiðingini 2007, sum er dagfest 29. oktober 2008, kunnar stýrið m.a. um, at 58 nýggj bjálvingarstuðulslán, 3.062 t.kr., eru goldin út. 1 tilsøgn er givin at hækka eitt verandi bjálvingarstuðulslán 41 t.kr. Onki nýtt orkusparandi lán eru stovnað, og ongar hækkingar hava verið í 2007 av orkusparandi lánum.

74 bjálvingarstuðulslán, 3,7 mió.kr., eru í árinum fult afturgoldin.

Útlán grunsins eru tilsamans 1.056 í tali. Við árslok 2007 hevði Bjálvingarstuðulsláns-grunnurin tilsamans goldið út 58 mió.kr ímóti veð í sethúsum.

- 999 lán, 55,3 mió.kr., eru rentu- og avdráttarfrí
- 57 lán, 2,3 mió.kr., eru løgd um til afturgjalding við rentu og avdrátti.

Grunnurin hevur ongan tøkan pening til nýggjar játtanir, men bert tann tøka peningin, sum kemur inn við rentum og avdráttum og fult afturgoldnum lánum. Tí eru umsóknir í stóran mun sýttar.

## 4.2 Roknskapargrannskoðanin

Løgtingsgrannskoðararnir skulu m.a. ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum. Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir m.a. á frágreiðing 21. oktober 2008 frá roknskapargrannskoðanini, Grannskoðaravirkinum Inpact. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Í grannskoðanarfrágreiðingini vísir roknskapargrannskoðanin m.a. á, at: “Rakstur grunsins vísti eitt úrslit – 288 t.kr., í mun til –481 t.kr. árið fyri. Meginparturin av lánunum eru rentufrí, og við verandi lógarkarmum og útlánsvirksemi svara inntøkurnar ikki til rakstrarkostnaðin. Tí er neyðugt hjá grunninum at fáa játtað part av fíggjarlógar-veitingini til rakstur.”

Roknskapargrannskoðanin vísir eisini á, at: “Gjaldførið hjá grunninum vísir ultimo 2007 eina hækking úr 7,7 mió.kr. til 7,8 mió.kr., og er tað alt ov lítið, samanborið við tørvin sambært innkomnum umsóknum til bjálvingar- og orkusparandi lán. Grunnurin hevur í árinum, eins og undanfarin ár, fingið nógvar umsóknir, men av tørvandi fíggjarorku hevur verið neyðugt at sýta nógvum umsóknum.”

# 5. Samskifti við landsstýrismannin

## 5.1 Tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap

2001 Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti".

Niðurstøðan í álitinum er m.a., at Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin er ein landsstovnur, og at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, at grunnurin ikki verður tikin við á fíggjarlógina og í landsroknskapin. Álitið vísir á, at í heilt serligum førum kann Løgtingið tó við lóg samtykkja at hava virksemið uttanfyri fíggjarlógina.

2003 Í oktober 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði gjørt av at leggja Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin saman, og at skipa tann endurskipaða Húsalánsgrunnin eftir sama leisti sum Føroya Realkreditstovnur.

2004 Í januar 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hóast løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, varð arbeitt víðari við teimum lógarbroytingum, ið snúði seg um tilknýtið hjá Bjálvingarstuðulslánsgrunninum til fíggjarlógina.

2005 Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið var partur av einum størri pakka, sum fevndi um nógvar grunnar, ið flestu landsstýrismenn varðaðu av. Viðvíkjandi Bjálvingarstuðulslánsgrunninum var ætlanin, at málið skuldi verða loyst á sama hátt, sum spurningurin um tilknýtið hjá Húsaláns- og Íbúðagrunninum til fíggjarlógina.

2006 Í januar 2006 og aftur í januar 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at málið ætlandi fór at verða loyst við við at umskipa Húsaláns-, Íbúða- og Bjálvingarstuðulslánsgrunnarnir til eitt partafelag.

2007 Í oktober 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at málið fór at verða loyst sum partur av arbeiðinum at taka av og endurskipa Húsalánsgrunninum.

2008 Í november 2008 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum boðað frá, at málsøkið í vár er flutt frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum til landsstýrismannin í fíggjarmálum. Nýggjur landsstýrismaður er settur í september, og tá ið hann hevur havt møguleika at sett seg inn málið, fer hann at taka støðu til, hvussu arbeiðið skal halda áfram.

## 6. Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna roknskapin hjá Bjálvingarstuðulslánsgrunninum fyri fíggjarárið 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið 13. mars 2007, høvdu løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

> *"Bæði stýrið og roknskapargrannskoðanin hava gjørt vart við, at grunnurin gevur hall, og hevur seinni árini verið noyddur at sýta nógvum umsóknum vegna vantandi fíggjarorku.*
>
> *Í uppskoti til samtyktar, "um at góðkenna roknskapin hjá Bjálvingarstuðulslánsgrunninum 2003" (Lm. 45-3/2004), sum varð samtykt 31. mars 2005, hildu løgtingsgrannskoðararnir tað vera sera óheppið, at grunnurin í áravís ikki hevur virkað samsvarandi lógini, og løgtingsgrannskoðararnir heittu á landsstýrismannin um at skunda undir at fáa málið loyst.*
>
> *Vísandi til ársfrágreiðingina og grannskoðanarfrágreiðingina má grunnurin framhaldandi sýta nógvum umsóknum um bjálvingar- og orkusparandi lán til pensjónistar, og kann tí ikki í fullan mun virka samsvarandi lógini.*
>
> *Løgtingsgrannskoðararnir heita tí enn einaferð á landsstýrismannin um at loysa málið."*

Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at ongar broytingar eru framdar, hóast hesi viðurskifti eru umrødd í áravís.

**Løgtingsgrannskoðararnir, 29. januar 2009**

| | |
|---|---|
| Heini O. Heinesen, formaður | Magni Laksáfoss, næstformaður |
| Anfinn Kallsberg | Mikkjal Sørensen |